## Fall í oljuprísinum



Eftir at forsetin í Egyptalandi, Hosni Mubarak seinasta fríggjadag fór frá, hevur prísurin á olju verið støðugt lækkandi tað seinastu tíðina. Seinasta fríggjadag var hann á tí lægsta støðinum tær seinastu 10 vikurnar. Ein tunna av amerikansku tilvísingaroljuni, WTI, kostaði á virðisbrævamarknaðinum í New York seinasta fríggadag 85,58 dollarar fyri tunnuna. Prísurin er lækkaður 7,7 % síðani 31. januar, tá ein tunna kostaði 92,19 dollarar.

Í mun til maj 2010, tá ein tunna var seld fyri 68 dollarar, er ein tunna tó framvegis hækka 25,8 % í mun til prísin í dag, skrivar Vinnuhúsið.



STREYMUR

*14. februar er valentinesdagur, tá vit eiga at forkelað tann, vit eru góð við*

# 3,8 milliardir krónur til romantikk

**ROMANTIKKUR 14. februar er í vesturheiminum kendur sum dagurin, tá vit sklu forkela tey, vit eru góð við.**

Eydna Skaale

Fyri mannfólkini endar tað ofta við eini bukett av rósum til makan, og tølini siga, at í dag verða fleiri enn 100 mió reyðar rósur seldar um allan heim.

Tað tykist eisini vera týdningarmikið, serliga fyri konufólkini, at fáa rósur - og tølini vísa, at fleiri enn 15% av øllum konufólkum senda blómur til sín sjálvs á valentines degnum.

Men dagurin snýr seg ikki bara um romantikk, hann er eisini stak góður fyri sølutølini. Ein stór kanning vísir, at fólk í øllum heiminum fara at keypa valentinesgávur fyri í miðal 429 kr, og um allan heim verður upphæddin, sum verður brúkt til gávur, góðar døgverðar, góðgæti, vín og blómur tilsamans 3,6 milliardir kr.

So er spurningurin bara, hvussu nógvar av teimum krónunum, vit nýta til at forkela hvønnannan her í Føroyum.



*Húsakeyp fara sum kunnugt í alsamt størri mun fram ígjøgnum meklarafyritøkur. Hetta átti at borga fyri størri brúkaratrygd, men ger tað ikki vegna væntandi lógarkrøv. Tvørturímóti kann keyparin fáa falska trygd, eitt nú við at hann fær ta fatan, at støðulýsing er gjørd av ognini, hóast lýsingin bert byggir á upplýsingar frá seljaranum sjálvum.*

*Bjørt Samuelsen, tingkvinna fyri Tjóðveldi*



# Enniberg yvirtikið pantið

**P/F Enniberg hevur ikki bara leigað ísfiskatrolararnar, Jaspis og Ametyst, men felagið hevur eisini yvirtikið pantið í skipunum**

Vilmund Jacobsen

Tað er ikki heilt rætt, tá Útvarpið hjá Kringvarpinum í dag bar tíðindini um, at tað er búgvið eftir Faroe Seafood, sum hevur leigað P/F Ennibergi ísfiskartrolararnar, Jaspis og Ametyst.

Felagið, sum eigur skipini, Faroe Fish I, er ikki farið á húsagang, og tí er tað leiðsla og nevnd felagsins, sum hava avgerðarrættin um eitt nú leigumál.

P/F Enniberg hevur leigað skipini og hevur eisini yvirtikið pantið í skipunum.

Hvat merkir hetta so, og kunnu vit siga, at skipini eru seld?

- Nei, hetta merkir ikki, at skipini eru seld, men tað merkir, at P/F Enniberg í tíðini, leigumálið fevnir um, hevur "keypt" kravið, sum fíggingarstovnurin hevur í skipunum: Kelda, sum Sosialurin hevur tosað við, og sum veit tað, sum er at vita um hesi viðurskifti, sigur, at fíggingarstovnurin og P/F Enniberg hava "skift" um pláss, sum keldan málber seg.



ELDUR

*Eingin mansskaði hendi, tá eldur kom í ein bil á Strondum í nátt*

*Mynd: Bergur Østerø*

# Eldur í bili

**112 Í nátt kom eldur knappliga í ein bil inni á Strondum, meðan bilurin koyrdi**

Leo Poulsen

Bilførarin slapp tó óskaløður út úr bilinum, áðrenn sløkkiliðið á Skála/Strondum kom á staðið.

Klokkan 03.41 fekk løgreglan boð um, at eldu var komin í ein bil meðan hann koyrdi við Sjógv á Strondum. Løgreglan hevði tveir løgreglumenn inni í Runavík um hetta mundi, og teir vóru tí skjótir á staðnum og avhoyrdu bilføraran.

Sløkkiliðið á Skála/Strondum var eisini boðsent og teir fingu sløkt logandi bilin. Talan er um ein Citroeng C5 frá 2003, sum nú verður nærri kannaður.

Tað er rættiliga óvanligt, at eldur soleiðis kemur í ein koyrandi bil. Sagt verður av løgreglustøðini, at bilurin annars var í góðum standi.

